


# DUPULT TÍÐ

Óli Johansen hevur so líðandi funnið fram til mátan, at fáa tað besta burtur úr rávøruni. Her er serliga talan um turra fiskinum, sum eftir hansara meting er tann besti á marknaðinum.

Fyrimunurin er, at fiskurin verður turkaður úti og heilt niðri við sjóvarmálan á Tvøroyri. Í ár er kortini ein broyting hend. Tað vísir seg, at toskurin og hvítingurin eru feitir og sera væl fyri.

- Hetta hevur gjørt sítt til, at tað tekur dupult so langa tíð at fáa hann turran. Men tá hann so er vorðin turrur, er hann hann ótrúliga góður, staðfestir Óli Johansen.

**SUÐRINGURIN**

*– Hesin fiskurin hongur úti og heilt niðri við sjóvarmálan. Tí verður hann so góður, sigur suðringurin Óli Johansen á Eldborg*

Mynd: Jens Kristian Vang